Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Tær stóru fyrimyndirnar

Oddagrein

Í hesum døgum fer fram ein av størstu ítróttarligu hendingunum í Europa - Europameistaraskapurin í fótbólti, sum hesa ferð verður spældur í Belgia og Hollandi. Nógv eygu eru vend ímóti hesi hending, og fjølmiðlarnir gera so nógv burtur úr, at eingin mann vera í iva um, hvat tað er sum fer fram.

EM í fótbólti er tríggjar vikur við tí besta fótbóltsspælinum, sum okkara partur av heiminum kann vísa. Tað er hátíðarlig og spennandi hending, sum fær alt Europa - og fólk í øðrum londum - at fylgja við í kappingini. Stjørnurnar á vøllinum eru óteljandi og ymiskar, og tað eru nógvir av hesum spælarum, sum eru stóru fyrimyndirnar hjá okkara børnum og ungdómi. Og tað er einki løgið í tí. Hesi spælarar eru dømi um dreymin, sum verður til veruleika. Dreymin, sum bara tey fægstu sleppa at uppliva aðrastaðni enn í dreymalandi.

Nógvir føroyingar ynskja, at tað skal ganga Danmark og hinum norðurlondunum væl í slíkum kappingum, men tá hesi orðini verða skrivað, er tað bara Noregi, sum hevur ein møguleika at sleppa víðari frá bólkaspælinum. Bæði Danmark og Svøríki eru úti av kappingini. Svøríki var óheppið í seinasta dystinum, tá teir umsíðir vístu, hvat teir duga til, og Danmark hava bara í løtum víst nakað, sum varð vert at klappa fyri. Danski innsatsurin hesaferð hevur verið langt frá teimum stóru døgunum í Fraklandi fyri tveimum árum síðani, tá Danmark endaði millum átta tey fremstu londini í heiminum.

Enn hava føroyingar ikki gjørt vart við seg millum tey sterkastu londini í Europa, men tað er stuttligt at hugsa um, at kekkar, sum eru eitt av londunum í endaspælinum, við neyð og deyð - og eittt sindur av vánaligum ítróttaranda - vunnu dystin móti føroyska landsliðnum á Svangaskarði. Ein av kekkisku spælarunum hevur eisini havt leikbann í tveir dystir, tí hann fekk reytt kort móti Føroyum. Hetta eru alt prógv um, at føroyingar spæla við millum teir stóru, og sjálvt um vit ikki eru við til endaspølini, so hava vit ávirkan á, hvør tað er, sum sleppur so langt. Føroyingar fáa eisini vitjan av nógvum av hesum endu fótbóltsspælarunum, og tað er við til at eggja og stimbra okkara heimligu spælarar - bæði yngri og eldri.

Sjónvarp Føroya vísir alla herligheitina frá Belgia og Hollandi, og tað er fínt. Tað bilar einki, um vanliga skráin hjá SVF verður órógvað eitt sindur í tríggjar vikur, tá orsøkin er tað framúr undirhaldið, sum flestu føroyingar gjarna vilja síggja. Hevði SVF ikki sent dystirnar, ja, so høvdu føroyingar bara lagt saman við onkrari aðrari sjónvarpsrás. Og nú EM-kappingini fer inn í avgerandi partin, økist spenningurin, og tað er nú, at stóru avgerðirnar fara at falla. Hvør er drúgvast, hvør má lúta, hvør kann fegnast og hvør má syrgja. Alt verður avgjørt næstu 10 dagarnar.

Sosialurin

Viðmerking:

Menniskju og bátar

Utställningen Människor och båtar i Norden från Sjöhistoriska museet i Stockholm besöktas ombord på m/s Nordwest av 5.000 färöbor under de 5 dagar den visades i Torshavn.

Planen var att fortsätta till Reykjavik efter utställningens stängning på måndagkvällen men stormen med vindbyar upp till 38 sekundmeter och våghöjder på 9 meter gjorde det omöjligt med tanke på den omtåliga lasten. Avfärden planeras istället till onsdagen och öppnandet av utställningen i Reykjavik blir troligen på Islands nationaldag den 17 juni.

Tack för ett spännande möte med Färöarna och alla intressanta färöbor som sakkunnigt besökt vår utställning!

hälsn Pär Stolpe
Sjöhistoriska museet

Gongulagskapping Íslandsrossafelagnum

Vikuskiftið 24. og 25. mai verður skipað fyri gongulagskapping á vøllí felagsins á Kráarheyggi. Og er hetta sostatt tann næstseinasta kappingin í hesum kappingarárinum. Tað hevur verið ógvuliga stór framgongd við luttakaratalinum fyri hvørja kapping í ár, og vóna vit tað sama hesa kappingina.

Til fyrstu kapping í ár byrjaðu vit uppá nakað nýtt, tað var at hava kappríðing í trav og skeið á vølli Føroya Ríðingafelags í Havnardali, og var tað sera góð undirtøka í hesum, og eydnaðist hetta serstakliga væl, henda kapping byrjar kl. 10.00 leygarmorgunin.

Kl. 14.00 sama dag verður kappast í fjórgongd, fimmgongd og tølt, hetta er tað innleiðandi umfarið, og verður hildið fram við finalu umfarinum sunnudagin kl. 14.00. Seinasta freist at tekna seg til kappingina er hóskvøldið 22.06. áðrenn kl. 21.00 á telefon 315078, 217688 ella 311830/211830.

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi virkin eitt ár

Áhugabólkurin hevur fingið positivar viðurkenningar frá nógvum fólkum,ið halda tað vera neyðugt at bjóða tí einstaka, ið er merktur av sorg, stuðul. Fleiri hava stuðlað arbeiðinum á tí økonomiska, eins væl og á tí moralska økinum.

Reyði Krossur roynir at lætta pínuna hjá tí einstaka, uttan mun til hvørja lívsáskoðan viðkomandi umboðar.

Endamálið við Sorgarlinjuni er at bjóða menniskjum, ið brádliga hava mist ein av sínum næstingum, í ein sjálvhjálparbólk. Her fáa tey høvi at koma saman við øðrum, ið eisini kenna seg tyngd av sorg.

Nógv fólk hava sagt frá, at tey fingu stóra umsorgan bæði frá familju og vinum eftir ólukkuna; men sum fráleið kendu fleiri einsemi og vónloysi skugga framtíðarvón teirra. Møguleikin at halda fram at liva á ein øðrvísi og nýggjan hátt kendist veruleikafjarur.

Ein hjálpandi hond, tað verið seg at lurta ella á tí praktiska økinum hevur alstóran týdning.

Sera umráðandi er, at tann ið kennir sorg, sjálvur roynir at gera nakað ítøkiligt fyri at koma víðari. Hetta er eisini galdandi fyri tann, ið hevur verið fyri ómetaliga stórari ólukku og ræðuleika, hvar kenslan av ruðuleika og angist hevur fingið ræðið.

Fyri mong fólk hevur tað alstóran týdning at fáa høvi at siga frá ólukkuni aftur og aftur, eftir at ein kærur so brádliga verður ryktur burtur. Endurtøka styrkir og mennir tann sorgarbundna at koma víðari. Sum frálíður gerst lættari at endurtaka hendingina og tann, ið farin er, fær eitt tyðuligt og hvílandi pláss í hugaheiminum hjá teimum, ið liva eftir. Tað fyrr so pínufulla plássið finst ikki longur og lívið byrjar av nýggjum.

Ein sannroynd er, at samtalur við onnur fólk ávirka teg til at síggja støðuna øðrvísi og kenslan at stýra egnum tankum og upplívingum venda aftur.

Eimskip broytir ferðaætlan

Tann 1. juli kemur í gildi nýggj siglingarætlan fyri Skandinaviarutuna hjá Eimskip.

– Endamálið við hesari broyting er at betra um flutningstænastuna fyri viðskiftafólk okkara, sum flyta vørur úr Danmark til Føroya, sigur Eimskip í tíðindaskrivi.

Skipið verður hvønn fríggjadag í Aarhus í staðin fyri mikudag og verður í Havn mánamorgun. Nú verður møguleiki at lata inn góðs í Aarhus fríggjamorgun og fáa tað útflýggjað í Føroyum mánadag.

Konsert við dreingjakóri úr Herning

Syngja í kvøld í Fríðrikskirkjuni og Toftum og í morgin í Skálanum í Kommunuskúlanum í Havn

Seinastu dagarnar hevur Hernings Kirkes Drengekor verið á vitjan í Føroyum. Teir hava havt konsertir í Fuglafirði og í Klaksvík. Í kvøld verður konsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum klokkan 19:30 og í annaðkvøld kl 19:00 verður konsert í Skálanum í Kommunuskúlanum í Havn.

Í dreingjakórinum úr Herning eru 45 dreingir og ungir menn, har stórt sæð allir hava verið í kórinum síðani teir gingu í 3. flokki í fólkaskúlanum.

Dreingjakórið er fyrst av øllum stuðul í guðstænastuni hjá Herning kirkju, en kórið hevur eisini ferðast víða og hildið konsertir. Kórið hevur m.a. verið á konsertferð í Bretlandi, Ungarn, Finlandi og Skotlandi.

Sangskráin er fjølbroytt. Hon fevnir frá gregorianskum sangi til nýggjan tónleik, sum er skrivaður til kórið.

Dreingjakórið hjá Herning kirkju hevur eisini fleiri ferðir havt konsertir í danska útvarpinum og sjónvarpinum og hevur givið út plátur og fløgur.

Kórleiðari hjá Dreingjakórinum í Herning kirkju er urguleikarin í kirkjuni, Mads Bille, sum hevur stjórnað kórinum síðani 1984. Undirspælari er Birthe Langdahl, sum eisini starvast sum urguleikari í kirkjuni.

Í Kommunuskúlanum í Havn hevur seinasta árið verið eitt dreingjakór við ein 25 - 30 dreingjum frá 3. - 5. flokk. Tað er Bjarni Restorff, sum hevur vant dreingirnar.

– Tað er ikki bara sum at siga tað, at fáa dreingir at syngja, sigur Hanus Joensen, skúlastjóri, sum heldur, at konsertin við danska dreingjakórinum er eitt gott høvi at vísa føroysku dreingjunum slíkan kórsang.

Konsertin í Kommunuskúlanum verður í annaðkvøld, fríggjakvøldið, klokkan 19 - og tað er ókeypis atgongd, sigur Hanus Joensen.

†

SVEND VILHELMSEN
Tórshavn

andaðist týsdagin 20. juni, 89 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin 23. juni klokkan 14.

Fyri tey avvarðandi
Ady, Ninna og Kaj

Politistarnir ræðast lógina

Politistarnir eru alt annað enn fegnir um broytingarnar í nýggju ferðslulógini. At fólk ikki missa koyrikortið, tá tey koyra 175 km/t, hóvar ikki teimum svørtklæddu

Politistarnir eru ónøgdir við, at fólk bert fáa treytaða frádøming av koyrikortinum, tá koyrt verður langt yvir loyvda mark
Mynd: Jens Kr. Vang

DIA MIDJORD

Varafútin Finn Ougaard og onnur fólk frá ákæruvaldinum høvdu eina torføra uppgávu at loysa í gjár. Á fundi í Havn fingu politistarnir at vita, hvussu nýggja ferðslulógin skal skiljast og handfarast. Men hetta var heldur lættari sagt enn gjørt.

Politistarnir eru nevniliga rúkandi ósamdir. Serliga eru teir ónøgdir við broytingina í sambandi við brot á mest loyvdu ferð. At ein bilførari bert fær treytaða frádøming av koyrikortinum, um hann koyrir 175 km/t, er heilt óskiljandi, halda politistarnir.

Eftir verandi lóg eru reglurnar greiðar. Koyrir tú skjótari enn 30 km/t oman fyri loyvdu hámarksferð, missir tú koyrikortið. Nýggja lógin gevur tær treytaða frádøming av koyrikortinum. Tú missir ikki kortið, um tú næstu trý árini heldur tær í skinninum.

Uni Vestureið, politikommiserur heldur ikki, at politistar skulu óttast
Mynd: Jens Kr. Vang

Kommiserurin ósamdur

Uni Vestureið, politikommiserur, hevur ikki sama illgruna til nýggju lógina.

– Nýggja lógin er eitt gott amboð, sum avgjørt er vert at royna. Hon er eisini nógv meira pedagogisk. Verandi lóg konsentrerar seg um hvørt einstakt brot, meðan nýggja lógin sær meir upp á heildina hjá hvørjum einstakum førara, sigur Uni Vestureið.

Politikommiserurin ivast ikki í, at henda nýggja lógin fer at hjálpa til, soleiðis at ferðsluhugburðurin hjá føroyingum fer at broytast til tað betra.

Dýrar bøtur

Hóast tú ikki spælir av við koyrikortið, um tú verður tikin at koyra ov skjótt, so kanst tú spæla av við fitt av pengum. Tað er nevniliga soleiðis, at nýggja lógin ásetir bótina í mun til, hvussu nógv tú hevur koyrt ov skjótt.

Vit kunnu taka tvey dømi.

Loyvda hámarksferð er 50 km/t, og tú verður tikin at koyra 72 km/t við persónbili. Tú mást rinda1000 krónur í bót.

Loyvda hámarksferð er 80 km/t, og tú verður tikin at koyra 125 km/t við persónbili. Tú mást rinda 1500 krónur í bót.

Á talvuni niðanfyri sært tú, hvussu nógv tú skalt rinda, um tú verður tikin av politinum.

Hámarksferð

	Sektargjald *)					
%	50	60	70	80	1	2
u/20	51-59	61-71	71-83	81-95	400	600
20-29	60-64	72-77	84-90	96-103	600	900
30-39	65-69	78-83	91-97	104-111	850	1.300
40-49	70-74	84-89	97-104	112-119	1.000	1.700
50-59	75-79	90-95	105-111	120-127	1.500	2.200
60-69	80-84	96-101	112-118	128-135	1.900	2.900
70-79	85-89	102-107	119-125	136-143	2.400	3.600
80-89	90-94	108-113	126-132	144-151	3.000	4.500
90-99	95-99	114-119	133-139	152-159	3.700	5.600
100-109	100-104	120-125	141-146	160-167	4.500	6.800
110-119	105-109	126-131	147-153	168-175	5.400	8.100
120-129	110-114	132-137	154-160	176-183	6.400	9.500

Brot á hámarksferð í % og km/t

*) Sektargjald 1: persónbílar og motorsúkklur
Sektargjald 2: bussar, lastbílar og vognarað

Hesar eru nakrar av broytingunum í nýggju ferðslulógini

Verður tú tikin at koyra ov skjótt, og koyrikortið verður treytað frádømt, so fært tú eina royndartíð upp á 3 ár. Kemur tú aftur í klórnar á politinum, so fellur hamarin og koyrikortið rýkur. Og tað er líkamikið, um talan tá er um eitt annað brot á ferðslulógina.

Hevur tú treytaða frádøming av koyrikortinum, so noyðist tú upp til eina royndar, ið fevnir bæði um teori og praksis. Bileftirlitið setir eina freist og tú mást fylgja harraboðum. Annars missir tú koyrikortið.

Lægri promillumark

Markið fyri promillukoyring er flutt niður frá 0,8 til 0,5.

Verður tú tikin við millum 0,5 og 0,8 promillu í blóðinum, fært tú treytaða frádøming av koyrikortinum og eina bót. Royndartíðin er trý ár. Brýtur tú aftur ferðslulógina, missir tú koyrikortið.

Verður tú tikin við millum 0,8 og 2,0 promillu í blóðinum, missur tú koyrikortið og fært eina bót.

Verður tú tikin við meir enn 2,0 promillu í blóðinum, missur tú koyrikortið og skalt inn at sita